## Jólatúrur til Edinburgh í desember

Seinastu árini hevur Norrøna vitjað Aderdeen, Inverness og Edinburgh um jóltíðir. Í ár verður aftur vitjað Edinburgh, sum tey á Smyril Line halda vera ein sera spennandi bý. Umframt hópin av handlum og sølumiðstøðum, so er býurin á tremur av søgu, mentan og arkitekturi. Eitt annað sum ger túrin í ár sera hugaligan er, at tað tekur bert 24 tímar at sigla higar. Norrøna leggur frá landi mánamorgun 3. desember kl. 9. Skipið liggur í Edinburgh til mikumorgunin kl. 10.30, tá ið hon leggur leiðina. Sostatt hava fólk eitt heilt samdøgur at uppliva Edinburgh við øllum tí, sum býurin hevur at bjóða. Á túrinum verður búð umborð á Norrønu, har Hilmar Jan, Jens Marni Hansen Band, Stanley Samuelsen og onur fara at undirhalda gestunum. Vanliga plaga millum 500 og 800 fólk at vera við á slíkum túrum.




# Ynskja ikki serskúla fyri børn við breki

**Foreldur at brekaðum børnum í Runavíkar kommunu eru hart ímóti, at kommunan hevur ætlanir um at koyra hesi børnini í ein serligan skúla. Eins og onnur børn hava børn við breki brúk fyri at vera millum vanlig børn. Ein áheitan frá foreldrunum kemur fyri á býráðsfundi í kvøld**

UNDIRVÍSING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Børn við breki eiga ikki at verða sett í serligan skúla, men sleppa at vera saman við øllum øðrum børnum, halda foreldur at brekaðum børnum í Runavíkar kommunu*

Ein bólkur av foreldrum at børnum í serflokkunum í Søldarfirði, ið umfatar børn í Runavíkar kommunu, hava heitt á býráðið um at lata hesi børnini sleppa at ganga í skúla á Glyvrum saman við øðrum børnum í kommununi.

Tilsamans snýr hetta seg um tveir serflokkar við átta børnum, sum eru fødd við ymsum brekum. Tey flestu eru rørslutarnaði og deyv ella blind, meðan eitt hevur Down Syndrom. Trý børn hava autismu, men hesi ganga í Lamba skúla. Sambært foreldrum og lærarum hjá hesum børnunum er best fyri tey børnini við autismu at vera í slíkum friðarligum umhvørvi, sum tey hava í Lamba. Tó halda tey, at tað er gott fyri hesi børnini og onnur vanlig børn, at tey síggjast av og á. Áheitanin er stílað til allar býráðslimirnar.

Foreldrini vísa á, at børnini eru sera ymiskt fyri, og tí er tørvurin á undirvísing ymiskur. Undirvíst verður út frá førleika og tørvi hjá hvørjum einstakum barni. Talan er um allar vanligar lærugreinir sum at lesa, rokna, heimstaðarlæru, kristni, køk, smíð, tónleik, fimleik, svimjing og so framvegis. Tó fer undirvísingin mest fram á serligan hátt, og flestu børnini hava ikki allar lærugreinir.

Nøkur av børnunum eru við til fríkorterini. Nøkur hoyra til ein vanligan flokk og eru við til ávísar tímar hjá tí flokkinum, meðan onnur bara eru í serstovum. Flestu børnini eru við til morgunsang hvønn morgun.

Nú nýggjur og stórur skúli verður bygdur í Runavík, óttast foreldrini at teimum brekaðu børnunum, at hesi gerast taparanir. Í áheitanini frá foreldrunum til býráðslimirnar stendur millum annað:

»Tá vit hugsa um, hvørji atlit ein kann hugsa um í mun til, um hesi børnini skulu vera við tí vanliga skúlanum, hava vit hesi hugskot til atlit: sosial samvera, síggja atburð hjá vanligum børnum, hava møguleika av knýta vinarbond við vanlig børn, at atgongd er til bókasavn og annað náttúrligt á einum størri skúla og at hjálp er í gongdini á skúlanum at hava fastar rammur viðvíkjandi tíðini.«

Víðari skriva foreldrini: »Fyri børnini er tað eisini gott, at teirra lærarar arbeiða í einum jaligum og mennandi umhvørvi. At lærarar hava møguleika at halda seg til útgangsstøðið í vanligari undirvísing og framburðinum, sum hendur alla tíðina, at teir hava eitt størri fakligt umhvørvi, at teir kunnu undirvísa øðrum enn hesum børnunum, at teir ikki mugu skipa fyri serligum sosialum tiltøkum á jólum, føstulávint, men at tey eru saman í einari størri eind.«

Foreldrini leggja dent á, at tað ikki er ætlanin, at teirra børn skulu órógva vanligu næmingarnar í skúlagongdini.

»Okkum kunnugt gera tey ikki tað. Uttan iva skulu tey (vanligu børnini, blm.) venja seg við at vera saman við okkara børnum, men fyri vanligu næmingarnar eru fleiri dømi um, at tey læra nógv av at vera saman við okkara brekaðu børnum: Tey læra at vera meira tolorant við at síggja, at øll ikki hava tað so gott sum tey. Foreldur hava fortalt, at børnini duga væl við eldri fólki og tosa við tey við respekt. Vit koma ikki beinleiðis á nakað jaligt atlit, um hildið verður, at tað er best at vera á einum serskúla og ikki saman við vanliga skúlanum«, skriva foreldrini til býráðið í Runavík, sum altso kemur fyri á býráðsfundi í kvøld.

# 2.230 krónur úr Samhaldsfasta

**Stýrið fyri Samhaldsfasta hevur gjørt av at hækka eftirlønina úr grunninum við umleið 20% frá 1. januar komandi**

PENSJÓN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin – vanliga nevndur Samhaldsfasti - samtykti á fundi í dag at hækka eftirlønina úr grunninum við umleið 20 % frá 1. jan 2008, soleiðis at eftirlønin verður 2.230 kr um mánaðin, sum er 26.760 kr um árið. Ásetingin er galdandi fyri árið 2008. Øll, sum hava fylt 67 ár, fáa eftirløn úr grunninum.

Løgtingslógin um eftirlønargrunnin er frá 1991, men hon er broytt nakrar ferðir. Lógin ásetir, at stýrið fyri grunnin skal áseta útgjaldið eina ferð um árið fyri álmanakkaárið eftir.

Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar hava síðan 1. januar 1992 goldið í grunnin. Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar rinda ein prosentpart av ávikavist a-inntøkuni og útgoldnu lønini, so hvørt lønin verður útgoldin. Arbeiðsgevarar kunnu tó velja at rinda so hvørt, lønin verður útgoldin, annars fáa teir rokning fyri undanfarna árið. Frá 1. januar 2007 hava lønmóttakarar og arbeiðsgevarar rindað hvør 1,5% av lønini og frá 1. januar 2008 hvør 1,75% av lønini.

Eftirlønarveitingin er ásett soleiðis, at grunnurin sleppur undan at lækka hana seinni, og í staðin fyri hevur møguleika fyri at lata eina vaksandi upphædd, sum í minsta lagi veksur líka nógv sum inflatiónin.

Reglurnar um útgjald úr grunninum eru ásettar í løgtingslóg nr 39 frá 07.05.1991, sum seinast broytt við løgtingslóg nr 129 frá 28.12.2006 og í kunngerð nr 44 frá 09.05.1997. Eftir hesum reglum er tað Toll- og Skattstovan, sum stendur fyri útgjaldinum, og hvønn mánað setur veitingina á konto hjá hvørjum eftirlønarmóttakara í sparikassa, banka ella postgiro.